# Munnlig próvtøka

## Leiðbeining til lærarar

| | |
|---|---|
| **Evni** | Evnið, sum próvtakarin í samráð við próvhoyraran hevur valt, at framløgan og marghátttaði teksturin skulu taka støði í. |
| **Spurdómur** | Skilagott er at byggja spurdómin taksonomiskt upp, so at lættari verður hjá próvtakaranum at skipa framløguna. T.d. kann spurdómurin vera tríbýttur: Greið frá – viðger – met um. |
| | Framløgan skal fevna um umleið tíggju minuttir. At stuðla framløguni skalt tú hava ein marghátttaðan tekst, t.d. ein talgildan framløgutekst. |
| **Tekstur til upplesturs** | Kunning um tekstin/tekstbrotið, sum próvtakarin skal lesa upp (høvundur, heiti, árstal og annað viðkomandi). |

### Úr námsætlanini

Próvhoyringin varir 20 minuttir, íroknað próvdøming. Próvtakarin leggur fyri við upplestrinum og framløguni. Restin av tíðini er faklig samrøðaa millum próvtakara og próvhoyrara við støði í munnligu framløguni og marghátttaða tekstinum.

Givið verður eitt próvtal við støði í einari heildarmeting av samlaða avriki próvtakarans, har upplesturin telur umleið 1/5, marghátttaði teksturin umleið 1/5 og munnliga próvhoyringin umleið 3/5.